Ættarstevna:

# Úr Múla til Singapore og aftur

**Seinasta vikuskifti vórðu hildnar í minsta lagi tríggjar ættarstevnur ymsastaðni í landinum. Í fríggjadagsblaðnum greiddu vit frá stevnuni hjá ættini við Neyst í Hvalba. Í Havn og Koltri var ættin hjá Hanus og Mariannu uttar í Stovu í Koltri savnað. Hesa ættarstevnu fara vit at umrøða í eini aðrari grein í komandi viku**



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

Í Klaksvík hittust leygardagin eftirkomarar hjá Sunnevu og Johannes Heinesen á Viðareiði. Døgurði var leygarkvøldið á sjómansskúlanum í Klaksvík. Tey vóru um 125 í tali. Tey, sum hittust her, vóru systkin, systkinabørn og trímenningar.

Vit fara at greiða eitt sindur frá ættini í hesi grein. Felags fyri ættirnar, sum hava ættarstevnu, er, at eftirkomarar eru spjaddir um allan heimin. Tað sama er við øðrum ættum. Hetta váttar bert, at føroyingar eru alla staðni. Hvør einstøk ætt hevur tó sína serligu søgu, sum er verd at tríva í.

**Lorvíksdrongur og toftagenta enda á Viðareiði**

Fyrst eitt sindur um hesa ættina:

Johannes Heinesen varð føddur 25. mars 1854 í Lorvík. Foreldrini hjá honum vóru Heini Johannesen og Cathrine Malene Jacobsdatter í Lorvík. Johannes kom til Viðareiðis at vera húskallur í prestagarðinum Ónagerði, sum eisini var bóndagarður við fleiri tænastufólkum. Johannes fekk gerði burturav Ónagerðshaganum og bygdi sær hús í 1877. Presturin, sum hevur víst honum hesa vælvild, man hava verið Jens Christian Evensen, sum var prestur á Viðareiði 1871-1877. Hann gjørdist seinni prestur í Hvalba og kom so inn á Nes sum próstur. Hann var giftur við Onnu, dóttir tann fyrsta Lützen í Føroyum. Hon hevur fingið niðurskrivað sína søgu, eisini sum prestakona á Viðareiði. Her er ein sera áhugaverd lýsing av lívinum í prestagarðinum. Søgan stóð í FF-blaðnum í 2003.

Johannes giftist í 1894 við Sunneve Lydersen, f. 21.01. 1868. Foreldur hennara vóru Malene Olesdatter og Joen Lydersen í Tøðuni á Toftum. Tað er áhugavert, at tað ganga heili 17 ár, frá tí Johannes bygdi húsini, og til hann giftist, men tá fekk hann eisini eina 14 ár yngri konu!

Her kann leggjast afturat, at Johannes átti eisini ein beiggja á Viðareiði, Jógvan. Hann fekk somuleiðis gerði burturav Ónagerðishaganum.

Johannes doyði á Viðareiði 6. mai 1919, 65 ára gamal og Sunneva doyði 5. mai 1948 í Klaksvík, 80 ára gomul.

**Tey fingu níggju børn:**

**1**. Else Malene f. 1895, gift í 1932 við Sámal Jákup Olsen f. 1893 í Skúvoy, har tey búsettust og fingu 2 børn.

**2**. Jóan Heine f. 1897, giftist í 1929 við Jense Nicoline Jacobsen f. 1907 á Viðareiði. Tey giftust inn í barnaheimið hjá Jóan Heina og fingu 11 børn. Í 1940 bygdu tey sær nýggj hús, og gamla húsið varð niðurtikið.

**3**. Cathrina Sophia Henrietta Davida, f. 1899. Giftist við Christian Johannes Simonsen f. 1899. Búsettust á Heygnum og fingu trý børn.

**4**. Oluffa Maria, f. 1905, gift í 1927 við Sámal Samuelsen úr Lorvík. Búsettust á Vágsheygnum í Klaksvík og fingu 8 børn.

**5**. Johannes, giftist til Múla. Komið verður aftur til hansara

**6**. Louis Heinesen, f. 1908, giftist í 1936 við Signhild Joensen, f. 1915, úr Norðdepli, búsett í Klaksvík. Fingu 2 børn.

**7**. Sigrid f. 1910, gift í 1930 við Thomas Johan Sigurd Mikkelsen f. 1907. Tey búsettust á Viðareiði og fingu 5 børn.

**8**. Joen Hendrik f. 1913, búði í Klaksvík. Giftist í 1976 við Signhild, einkjuna eftir beiggjanum Louis.

**9**. Ein drongur kallaðist Óli. Hann doyr heilt ungur. Hann er vist føddur millum Davidu og Oluffu, sum helst er uppkallað eftir honum.



***Børnini hjá Johannes og Minu***

*F.v. Óla Kristian Heinesen, Jóngerð Heinesen, Sunneva Olsen, Jóanes Heinesen, Eyðbjørg Røjbæk, Jenny Helena Jacobsen, Jana E. Hansen*



***Hetta eru systkinabørnini***

*F.v. Nikolina Olsen, Óli Olsen, Jann Heinesen, Annika Heinesen, Eli Elttør, Jens Jacobsen, Jón Olsen, Erik Jacobsen, Jóhan D. Heinesen, Villiam Røjbæk, Christian Røjbæk, Michelle Heinesen úr Singapore, Rolf Knudsen*

**Johannes fór til Múla**

Í hesi grein verður bert pláss at umrøða eitt av børnunum og hansara ætt. Hetta er Johannes f. 1907. Hann giftist í 1931 við Minu Frederiksen f. 1909 í Múla. Foreldur hennara vóru Johannes Frederiksen og Anna Maria Gregersen, ættað úr Kunoy.

**Johannes og Mina búsettust í Múla. Í 1958 flyta tey til Klaksvíkar. Tey fingu átta børn, og tey eru:**

**1**. Sunneva, f. 1933. Gift í 1953 við Frits Olsen í Klaksvík. Eigur trý børn.

**2**. Jana, f. 1934, gift í 1954 við Andrias Elttør, Klaksvík. Eigur trý børn.

**3**. Jóanes Meinhard f. 1936, giftur við Jonhild Hansen, úr Miðvági, búgva í Myklebust á Harøy. Eiga 4 børn.

**4**. Óla Kristian f. 1940, giftist í 1963 við Jonhild Danbjørg úr Porkeri, búsett í Klaksvík. Eigur ein son.

**5**. Jenny Helena f. 1942, gift við Eli Jacobsen, býr í Esbjerg. Hann er deyður, og hon er gift aftur við If Petersen. Eigur tríggjar synir.

**6**. Hans Marius f. 1946. Deyður í 1985. Komið verður aftur til hansara

**7**. Jóngerð Heinesen f. 1949, gift við Erik Rasmussen og býr í Esbjerg. Eigur 2 synir

**8**. Eyðbjørg f. 1953, gift við Freddy Røjbæk og býr í Esbjerg. Eigur 2 synir

**Múli var einaferð ein livandi bygd**

Sum kunnugt er Múli í dag ein útdeyð bygd, men tað hevur hon ikki altíð verið. Heilt aftur í 1737 vóru tríggjar familjur í Múla. Stóran part av 19. øld vóru fýra hús, og fólkatalið lá um tey 20. Fyrra partin av 20. øld lá fólkatalið undir 20, men í 1955 vóru tey heili 27. Tá fór at minka skjótt, og í 1975 vóru bert seks fólk í tveimum húsum. Eitt hús var tá flutt til danska Frilandsmuseet.

Tað var nógv ár nógv